FYLGISKJAL 9

LM-064/2020

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn 25.07.2020
J. nr.
Viðgjørt: J. C.
Tykkara j. 20/00596

Hoyringsskriv viðvíkjandi
Løgtingsmál nr. xx/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Ráðgeving og heimild til fígging av bústaðabygging)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn
(Ráðgeving og heimild til fígging av bústaðabygging)

MEGD tekur undir við ætlanini um, at fígging verður sett av til almannagagnligar bústaðaverkætlanir til fólk við serligum tørvi.

MEGD vísti til løgtingsvalið í 2019 á, at 149 fólk, sum bera brek, standa á bíðilista hjá Almannaverkinum til bústað. Tey flestu, sum mangla bústað, búgva í Suðurstreymoy.

MEGD vil tí heita á myndugleikin á økinum at raðfesta bygging av bústøðum til fólk við breki í Suðurstreymoy, har tørvurin er størstur.

MEGD vil vísa til ST sáttmálan grein 19, a), sum áleggur limalondunum at tryggja, at fólk, ið bera brek, sleppa at velja sær bústað og velja hvar og saman við hvørjum, tey vilja liva - á jøvnum føti við onnur - og tey skulu ikki vera noydd at liva í serligum bústøðum.

MEGD vil heita á myndugleikan, at áhaldandi fólkavøksturin í Føroyum ikki hevur við sær, at minni verður bygt til tey, ið hava serligan tørv, ella at eitt nú lestraríbúðir, ið her verða lýstar sum almannagagnligar bústaðaverkætlanir, verða raðfestar hægri enn bústaðir til fólk við serligum avbjóðingum.

Kanningar í Føroyum hava vist, at støðan sum fyritíðarpensjónistur kann viðføra trong fíggjarviðurskifti, sum hava ávirkan á møguleikarnar fyri bústaði (Biskopstø og

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

LM-064/2020

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Mýri 2007, https://pdfslide.net/documents/livikorini-hja-fyritidarpensjonistum-i-foroyum.html)

MEGD vil tí heita á myndugleikan at tryggja, at fólk, ið bera brek, sjálvi kunnu velja, hvørt tey vilja búgva í høvuðstaðarøkinum ella aðrastaðni í landinum, og somuleiðis tryggja, at leigukostnaðurin er á einum støði, so fólk við breki hava ráð til ein bústað eins væl í Tórshavn, um tey ynskja tað, sum aðrastaðir.

Vinaliga vegna MEGD

Tóra við Keldu, forkvinna

Jónvør Christiansen, aðalskrivari

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo